











# Tann nýggi BMW 5 á veg

**Nú kunnu BMW-fjepparar rættuliga gleða seg, tí um stutta tíð kemur tann nýggi BMW 500**

BMW 5-RØÐIN
*Eirikur Lindenskov*

Talan er um ein heilt nýggjan bil, og longu við fyrsta eygnabrá sæst, at talan er um ein elegantan bil, sum við kraftmikla skrokkinum kann umboða nýggju 5-røðina – sum eisini verður kallað »The Business Class«.

Og eygað snýtir teg ikki…

Komandi ættarliðið av limosinunum hjá BMW umboðar eitt ambitiøst heildarkonsept við nýggjum, vektsparandi trygdarskrokkum, gjørdir úr aluminium og stáli. Úrslitið av hesum er meira pláss, betri komfort, og samstundis er bilurin lættari og brennir harvið minni.

Tann neyvi undirvognurin ger, at bilurin verður lættur at koyra – eisini kann hetta gerast enn betur við elektroniskum skipanum – eitt nú heimsnýggjheitini, BMW Aktivstýring, og teirri aktivu stabiliseringsskipanin, ið verður nevnd »Dynamic Drive«.

Hesar skipanir gera bilin veruliga til ein dreym at koyra. Við 5-røðini er BMW samstundis eisini á odda við at koma við trygdardekkum, ið eru dekk, ið tú kanst koyra víðari við eftir punkteran.

Bilurin kemur á marknaðin í juli, og verður tað við einum kraftmiklum seks syl. motori, sum BMW 520i, BMW 530i og BMW 530d.

Teir báðir bensinmotorarnir geva ávikavist 170 og 321 hestakreftir, og hægsta snúningsmoment teirra er 210 og 300 Nm.

Dieselútgávan gevur 218 hestakreftir, og hægsta snúningsmomentið liggur heilt uppi á 500 Nm – m. a. takkað verið Common Rail í øðrum ættarliði.

Øll sniðini hava sekstrins gearkassa sum standard, og møguleiki er fyri automatgearum eisini við seks trinum.

520i, 530i og 530d klára accelerationina frá 0-100 km/t upp á 9,0, 6,9 og 7,1 sekund. Toppferðin er 230, 250 og 245 km/t. Nýtslan liggur upp á ávikavist 11,1, 10,5 og 14,5 km/liturin, mált í blandaðum ES kanningum.

Bilurin er 75 kg lættar enn tann gamli – hetta tí, at fremsti parturin á bilinum er úr aluminium. Saman við hástyrkistáli vísir henda konstruktión vegin innan nútíðar skrokkbygging.

Hóast hann er størri, og komfortin økt, býður nýggja 5-røðin á fleiri ting, ið fara at seta sín serliga dám á Businessklassan – væl at merkja við einum lutvíst lágari brennievnisnýtslu.

Tann nýggja 5-røðin sameinir dynamikkin í 3-røðini við sportsleikan í 7-røðini. Harvið leggur hann seg perfekt í miðjuna í programmpakkanum hjá BMW.



*Nýggja 5-røðin hjá BMW er eyðkend við serligu tvíbýttu lyktaeindini og coupéliknandi afturpartinum*